# ítróttur

Nr. 160 • hósdagur • 25. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

B36-FC Midtjylland:

# B36 trýr upp á tað




*Hóast B36 var undir stórum trýsti í Herning, so eydnaðist teimum eisini at skapa fleiri álop. Her er tað Mikkjal Thomassen, sum brýtir ígjøgnum í síðuni*

*Mynd: Høgni R. Øster*

**Uppgávan er trupul, men vit spæla heilt avgjørt fyri møguleikanum, sigur liðformaðurin hjá B36, nú liðið fyrireikar seg til týdningarmikla UEFA-Cup dystin**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Við einum teprum 1-2 tapi í viðførinum hevur B36 enn møguleikan at vinna seg enn eitt umfar fram í UEFA-Cup kappingini í fótbólti.

Hóskvøldið verður seinni dysturin millum liðini spældur, og tó at ein 1-0 sigur kanska ljóðar sum yvirkomulig uppgávu á pappírinum, so er eingin ivi um, at talan er um sera stóra uppgávu hjá B36. Nakað sum spælararnir eisini ásanna sjálvir. Nú liði fyrireikar seg til dystin, fingu vit orðið á Pól Thorsteinsson:

- Vit spæla sjálvandi móti einum betri liði, og tí skulu vit vera varnir á vøllinum. Sammett við til dømis ÍBV, sum vit vunnu á á ólavsøku, so er FCM eitt nógv betri lið, so í útgangsstøðinum verða vit helst nóg so verjukendir.

- Men hinvegin, so skulu vit bara hava eitt mál, og tí fara vit sjálvandi eftir. Bara tað at vit hava møguleikan, er eisini betri enn hvat nakar hevði væntað ella vóna, og tá møguleikin er har, so fara vit sjálvandi eftir honum, staðfestir hann.

## Grava seg ikki niður

Við einum verjukendum útgangsstøði meinar Pól tó ikki, at teir á nakran hátt fara at grava seg niður í verjupartinum.

- Tað nyttar so einki. Gera vit tað, so tapa vit dystin. Útgangsstøðið verður helst á leið tað sama, sum tað var í Danmark, har vit royna at vera væl skipaðir í verjupartinum, fyri síðani at taka kjansin, tá vit kunnu fáa hann frameftir.

Ta ferðina eydnaðist tykkum at halda FCM frá nøkrum opnum møguleikum rættiliga leingi. Men teir skoraðu kortini tvær ferðir eftir deyðbóltsstøður. Hava tit lagt dent á hetta í fyrireikingunum?

- Ja. Vit hava vant slíkar støður í vikuni, so vónandi eru vit betri fyrireikaðir til tann partin. Og so skuldi tað eisini bøtt um støðuna í so máta, at Fróði Benjaminsen nú er tøkur aftur eftir leikbann. Hann er ein av allar bestu føroysku spælarunum í luftini, so tað verður heilt víst ein stór hjálp, at hann aftur er við.

- Hartil, so kann tað verða ein fyrimunur hjá okkum, at Tórsvøllur ikki er so góður at spæla á. Teir spældu ikki serliga skjótt í fyrra dystinum, og kann vøllurin fáa teir at seta ferðina enn longur niður, so kann tað væl verða, at tað talar til okkara fyrimun, heldur Pól.

## Væntar dyggan stuðul

Saman við Fróða Benjaminsen er Bergur Midjord nú tøkur aftur hjá B36. Teir høvdu báðir leikbann seinast, og hesa ferð er tað so Kenneth Jacobsen, sum er leikbannaður. Hartil stendur tað heilt víst, at Herbert í Lon ikki verður klárur til dystin, meðan tað er heldur ivasamt við Inga Højsted. Ingi var ikki við, tá B36 sunnudagin tapti fyri NSÍ, og tað er einki at ivast í, at hann er ein ógvuliga týðandi brikkur í spælinum, um B36 skal hava møguleika at standa seg. Ikki minst, tá hugsað verður um fyrra dystin í Herning, har Ingi sngøgt sagt var besti maðurin á vøllinum.

Og so er tað spurningurin um áskoðararnar. Hesir vóru nógvir í tali, tá ÍBV vitjaði ólavsøkuaftan, og hóast Pól ásannar, at talan neyvan verður um heilt so nógv fólk hesaferð, so bæði vónar og væntar hann, at talan verður um dyggan stuðul.

- Á ólavsøku kendu vit veruliga, at vit vóru á heimavølli. Tí vóni eg, at talan aftur hesaferð verður um eina manssterka fjøld, sum kemur at stuðla okkum. Og her haldi eg eisini, at felagið hevur handlað rætt, tá teir ikki hava skrúvað atgongumerkjaprísin ov høgt upp, staðfestir Pól Thorsteinsson at enda.

## Stór Bridge-kapping

Í eru tað 14 ár síðani at Bridgehúsið í Havn varð sett á stovn. Í hesum sambandinum skipar nevndin í Bridgehúsinum fyri einari stórari almennari parakapping leygardagin 27. august 2005. Kappingin byrjar kl 13.00 og verður hon skipað sum ein barometur kapping, tað merkir, at øll spæla somu kort í sama umfarið og at gjørt verður upp eftir hvørt umfar. Tilmeldin verður á staðnum.

Tað eru teir báðir Rói á Rógvu Joensen og Heðin Mouritsen, ið skipað fyri kappingini.

**-bs**

## Svend Novrup havt skeið

Síðst vikuskiftið var navnframi danin Svend Novrup í Føroyum og helt nøkur bridgeskeiðir. Tað var nevndin í Bridgehúsinum í Havn, ið hevði fingið Svend Novrup hendavegin. Skeiðini vóru serliga ætla teimum, ið hava spælt bridge eina tíð og sum fegin vilja koma víðari. Luttakarinir vóru sera vælnøgdir við skeiðini og søgdu seg hava fingið nógv burturúr. Nevndin í Bridgehúsinum í Havn fer at arbeiða móti at fáa Svend Novrup aftur til Føroyar at hava nøkur onnur skeið. Svend Novrup var sjálvur sera vølnøgdur við vitjanina. Hann fegnaðist um, hvussu seriøs og konsentrerað tey, ið luttóku vóru. Svend Novrup sigur seg fegnan vilja koma hendavegin aftur at hava nøkur skeið.

Leygarkvøldið varð skipað fyri einari parakapping. Fimm borð luttóku í kappingini.

Nr. 1. Hannis Jacobsen - Heðin Mouritsen
Nr. 2. Hans Jacob Petersen - Steinbjørn Zachariassen
Nr. 3. Allan Dal-Christiansen - Robert Langaard

**-bs**

## Bridgetúrur til Hetlands

Bridgetúrurin til Hetlands, ið skuldi verða 22 til 24 september er fluttur eina viku fram, soleiðis, at farið verður av Havnini hósdagin 15. september ístaðin. Hetta tí, at Norrøna skal í dok áður lýsta túr.

**-bs**

## Ghanesiskur landsliðsspælari til Horsens

Felagið hjá Johan Byrial Hansen, AC Horsens, hevur nú styrkt um miðvøllin í royndunum at vinna seg upp um niðurflytingarstrikuna í donsku SAS-liguni.

Nýggjur maður er 31 ára gamli Charles Akonnor úr Ghana, og hann er ikki hvør sum helst. Hann hevur 51 ferðir spælt á landsliðnum hjá Ghana, og á yrkisleið síni hevur hann í 13 ár spælt sum yrkisleikari í Týsklandi. Her spældi hann seinast fyri Unterchaching, sum spælir í næstbestu týsku røðini, men hann eisini spælt fyri Wolfsburg og Fortuna Köln í bestu røðini.

Charles Akonnor verður mettur sum ein framrættaður miðvallari, og vónin er so, at sterka vinstra bein hansara skal skjóta neyðugu málini, sum AC Horsens enn tykist sakna.

Sáttmálin millum partarnar hevur gildið hetta kappingarárið.

**-jm**

## Verjustyrkur til FCM

Komandi mótstøðuliðið hjá B36, FC Midtjylland, hevur eisini styrkt um liðið.

Teir hava skriva sáttmála við Nicola Gosevski, sum tvær ferður hevur spælt á vinstra bakkinum hjá makedonska landsliðnum.

Gosevski verður tó ikki í hópinum, sum skal royna seg á Tórsvølli hóskvøldið. Hann er nevnliga komin til felagið eftir evstamark hjá UEFA fyri skráseting av spælarum.

**-jm**